


## Nýggjar bøkur frá Bókadeildini

Diddan er kedd og Diddan stríðist eru tvær fittar bøkur um didduna; í aðrari er hon kedd og vil einki, men verður glað aftur, tá ið hon fær eitt klemm. Í hinari stríðist og strevast diddan við sovorðið, sum er í taskuni hjá mammuni, áðrenn hon fer at leggja seg ímillum hjá mammu og pápa. Ann Forslind hevur skrivað og teknað, Niels Jákup Thomsen hevur týtt. Bøkurnar eru innbundar, 20 bls. og kosta 60 krónur hvør.

# Atlantsflog punkteraði undir lending



**Talan var um fyrrverandi flogfarið hjá FaroeJet, sum nú flýgur fyri Atlantsflog, sum punkteraði undir lending í gjárkvøldið**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tá flogfarið hjá Atlantsflog setti seg á flogvøllinum í Vágum um hálvgum níggjutíðina í gjárkvøldið, punkteraði eitt av hjólunum.

– Men vandi var ongantíð á ferð, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, í stuttari viðmerking.

Flogarið kom inn yvir Leynavatn, og undir sjálvari lendingini, punkteraði eitt av hjólunum.

– Vit vita ikki rættiliga enn, hvat hendi, men okkurt bendir á, at tað var eitthvørt við ABS-bremsiskipanini sum gjørdi tað, segði Magni Arge í stuttari viðmerking í gjárkvøldið.

Tá slíkt hendir, so blíva hjólini so heit, at skipanin automatiskt sleppir luftini úr hinum hjólunum, og tí vóru tað fleiri av hjólunum, sum mistu luftina.

Flogfarið koyrdi eitt sindur longri á breytini, enn tað plagar – og koyrdi fram við avkoyringini inn til terminalin.

Undir slíkum umstøðum ber ikki til at flyta flogfarið, og tí vórðu ferðafólkini koyrd inn til terminalin við bussum.

Magni Arge sigur, at flogfarið steðgaði normalt, og at eingin vandi var á ferð.

Magni Arge sigur eisini, at slíkt altíð skal takast í fullum álvara. Hann minnist ikki fleiri slíkar hendingar, burtursæð frá trygdarlendingunum í Noregi, tá trupulleikar vóru við flapsunum.

## ABS skipanin virkaði ikki

**ABS skipanin riggaði ikki sum hon skuldi, tá flogfarið hjá Atlantic Airways skuldi seta seta seg, boðar felagið frá í tíðindaskrivi í gjárkvøldið**

TÍÐINDASKRIV
*Atlantic Airways*

Stutt eftir midnátt sendi Atlantsflog soljóðandi tíðindaskriv út til miðlarnar:

"Tá flogfarið setti seg í Vágum í gjárkvøldið (týskvøldið), punkteraðu tvey hjól undir lending. Orsøkin var, at "anti skid (ABS) skipanin" virkaði ikki til fulnar.

Ferðafólk og manning vóru ongantíð í nakrari vandastøðu, tá lendingin í aðrar mátar fór vanliga fram."

# -Hendiligt óhapp



*Tað var gamla flogfarið hjá FaroeJet, sum Atlantsflog nú eigur, ið punkteraði undir lending í gjár*

**Jes Madsen, flogferðsluleiðari hjá Statens Luftfartsvæsen, sigur at punkteringar eru hendilig óhapp, sum kunnu koma fyri hjá einum og hvørjum. – Flogfør punktera sum bilar. Summi punktera ongantíð, og onnur tvær ferðir upp á ein mánað**

FLOGFERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hvussu vanligt er tað, at hjól punktera á flogførum?

Henda spurning settu vit Jes Madsen, flogferðsluleiðara (luftfartsinspektær, blðm.) hjá Statens Luftfartsvæsen, nú Atlantsflog var fyri enn einum óhappi. Hesaferð vóru tað hjólini, sum punkteraðu. Men sambært Jes Madsen, fær Atlantsflog ikki vart seg fyri hesum. Hann sigur, at tað púra vanligt, at flogfør punktera.

– Flogfør punktera júst sum bilar. Summi punktera ongantíð, meðan onnur punktera tvær ferðir innan fyri ein mánað. Tað er hendilig óhapp, sum tú ikki fært vart teg fyri, staðfestir Jes Madsen.

### Ymiskt frá flogfar til flogfar

Hann sigur, at tað er ymiskt hvussu punkteringar merkjast á flogførum.

– Á stórum flogførum við 16 hjólum merkist tað als ikki, tá eitt hjól punkterar, meðan punkteringar á flogførunum við færri hjólum merkjast betri. Lukkutíð er tað sjáldan, at størri skaðar koma fyri av punkteringum, sigur Jes Madsen.

Vit ynsktu at fáa eitt yvirlit ella nøkur hagtøl frá Statens Luftfartsvæsen, sum kundu geva eina ábending um, hvussu ofta punkteringar koma fyri. Hetta kundu vit ikki fáa áðrenn evstamark okkara, men Jes Madsen sigur, at hansara eygleiðingar siga honum, at

# – Púra ódramatiskt!



**Johan Dahl, løgtingslimur, var eitt av ferðafólkunum umborð á flogfarinum, sum punkteraði undir lending í gjárkvøldið. – Tað var púra ódramatiskt, sigur Johan Dahl**

FLOGFERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Johan Dahl, løgtingslimur, var millum ferðafólkini, sum í gjárkvøldið komu heim til Føroya við flogfarinum hjá Atlantsflog og hjólini punkteraðu, tá flogfarið skuldi seta seg. Hann sigur, at talan var um eina ódramatiska hending.

– Flogfarið kom niðurat harðliga og gjørdi síðani eitt lítið hopp. So gekk ein lítil løta áðrenn við hoyrdu ein brest, og so beint eftir ein aftrat, greiðir Johan Dahl frá, um tá hjólini punkteraðu.

–Síðani bremsaði flogfarið og royndi at steðga. Roynt varð at koyra inn upp á pláss, men hetta riggaði ikki heilt, so vit vórðu koyrd inn í bilum og bussum, fortelur Johan Dahl í morgun.

Aftaná vórðu ferðafólkini øll kunnaði um hvat var hent.

– Tað fungeraði væl, metir Johan Dahl, sum at enda staðfestir, at talan var um eina púra ódramatiska hending.